Frítíðarundirvísing

## Fylgjandi skjal vísur hvussu frítíðarundirvísingin í Sunda kommunu verður skipað.

### Kapitul 1

*§ 1. Kommunan skipar fyri frítíðarundirvísing sambært løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v.m. sum er seinast broytt við løgtingslóg nr. 124 frá 10. desember 2003.*

§ 2. Frítíðarundirvísingin er eitt kveikjandi tilboð til borgaran og kommunan ynskir, at undirvísingin er:

- mennandi, nýskapandi og upplýsandi
- Til bæði kvinnur og menn
- Fevnir um fleiri ættarlið
- Nýskapandi í innihaldi og lærugreinum

§ 3. Undirvísingin er skipað í **almenn frítíðarundirvísing**, sum er undirvísing fyri børn og vaksin yvir 14 ár. **Frítíðarvirksemi fyri børn og ung**, sum er undirvísing fyri børn og ung undir 25 ár og **serstøk undirvísing**, sum er undirvísing í føroyskum málið fyri útlendingar, undirvísing í teknmáli og orðblindaundirvísing.

### Kapitul 2

§ 4. Leiðari er settur fyri frítíðarundirvísingina og hevur leiðarin ábyrgd av at:

1. Úrvalið av lærugreinum er breitt og til bæði kyn
2. Nýggjar lærugreinar verða settar í skránna hvørt ár
3. Samskipa undirvísingartíðirnar
4. Samskipa, at skráin verður gjørd og lýst í faldara, í bløðunum, á sosialu miðlunum og á heimasíðuni hjá kommununi
5. Finna hóskandi høli runt um í størru bygdunum í kommununi
6. Leypandi kunna næmingar og lærarar
7. Saman við kommununi, at samskipa framsýning tíðliga í apríl mánað
8. At eftirmetingarskjal verður útflýggja øllum næmingum og lærarum at útfylla og latið aftur til kommununa

### Kapitul 3

§ 5. Leiðreglur:

1. Frítíðarundirvísingin er fyri borgarar í Sunda kommunu. Er pláss tókt er møguligt hjá øðrum at luttaka.

2. Frítíðarundirvísingin byrjar í september/oktober og varir til páskar. Tó kunnu styttri skeið fyriskipast.
3. Tilmeldingin er persónlig og bindandi og fer fram við at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna innan ásettu freistina.
4. Fær næmingur forfall og ynskir at taka tilmeldingina aftur, skal hetta boðast frá á kommunuskrivstovuni.
5. Um næmingur ynskir at fáa luttøkugjaldið endurgoldið, skal hetta fráboðast áðrenn 1. undirvísing.
6. Eftir at freistin er farin hava borgarar í Sunda kommunu ikki framíhjárætt.
7. Gjald fyri undirvísing er:
   fult skeið kr. 400
   styttri skeið kr. 300
   pensjónistar og lesandi gjalda hálvt gjald. (krevst galdandi prógv)
8. Næmingar gjalda sjálvir fyri tað tilfar, sum verður nýtt.
9. Eitt hold verður avlýst tá færri enn 6 luttakarar eru.
10. Eitt hold er fullteknað innan handaligar lærugreinar tá 12 luttakarar eru. Aðrar lærugreinar 18 (ella eftir avtalu við lærarin)
11. Tá skeiðini verða lýst skal skrivast í nær tilmeldingin byrjar og nær hon endar
12. Framsýningin er tíðliga í apríl mánað
13. Tá hvørt skeið er liðugt skulu næmingar og lærarar útfylla eitt eftirmetingarskjal.
14. Hagtøl verða gjørd útfrá eftirmetingunum.

Soleiðis samtykt av býráðnum í Sunda kommunu
29. mai 2017

Heðin Zachariasen, borgarstjóri

SUNDA KOMMUNA